# Lisbeth á NATO-fund

KUNNINGARSKRIV

Føroyingur umboðaðar Danmark á árliga fundinum og kunningarferðini fyri parlamentarikarar hjá Norðatlantisku verjusamgonguni NATO, sum í ár verður í Turkalandi í døgunum 5. til 11. september.

Øll NATO lond luttaka á hesi árligu kunningarferð og umboðið fyri danskar parlamanterikarar verður Lisbeth L. Petersen, fólkatingslimur.

Á fundinum verður møguleiki at hitta fleiri kendar turkiskar politikarar, m.a. Recep Tayyip Erdogan, forsætisráðharra, Abdullah Gul, uttanríkisráðharra, Vecdi Gönul, verjumálaráðharra og Abdulkadir Aksu, innanríkisráðharra.

Umframt at hoyra um støðuna í Irak, Afghanistan og Mið Asia verða eisini fyrilestrar um stríðið móti yvirgangi, narko og menniskjasmugling. Skipað verður fyri rundferðum í Turkalandi, m.a. verður vitjað á verjuakademiinum har politikarar verða kunnaðir um verjuviðurskifti.

# Skattalætti til heimligar fyritøkur

Fyri at verja fronsk arbeiðspláss hevur franska stjórnin gjørt av at lova skattalættar til fyritøkur, sum ikki flyta framleiðsluna til onnur lond, har lønin er lægri.

Heimasíðan hjá Business-Line skrivar, at franska stjórnin vónar, at eitt lyfti um skattalættar upp á 750.000 krónur yvir trý ár fer at fáa fyritøkurnar at støðast í landinum.

Franska stjórnin ætlar eisini at bjóða fyritøkum, sum longu eru farnar av landinum, ein niðurskurð í sosialum gjøldum til tess at fáa tær at tekkjast heimlandinum aftur.

Business-Line skrivar, at uppskotið fer at kosta 7,5 milliardir krónur í 2005.

# Fjarlestur góða undirtøku

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Handilsskúla á Kambsdali*

Góð undirtøka fyri fjarlestri 40 nýggir fjarlestrarnæmingar byrjaðu leygardagin á Handilsskúlanum á Kambsdali. Hetta eru fyrstu ferð at farið verður undir eina føroyska miðnámsútbúgving sum fjarlestur. Handilsskúlin á Kambsdali tók fyrr í ár stig til at bjóða FHS útbúgvingina sum fjarlestur. Endamálið var at røkka teimum málbólkum, sum av einhvørjari orsøk ikki dagligt hava møguleika at nema sær ein miðnámsútbúgving ella teir førleikar FHS gevur. Hugsað varð m.a. um okkara sjófólk, útjaðaran, fólk við likamligum breki, og fólk, sum av eittnú fíggjarligum ella sosialum orsøkum ikki hava møguleika at ganga á dagskúlanum. Meting skúlans av tørvinum má sigast at vera røtt, tí undirtøkan hevur verið nógv betri enn skúlin hevði væntað. Um 40 næmingar hava teknað seg til lærugreinarnar marknaðarførsla, virkisbúskap, kunningartøkni og enskt, sum blivu bodnar út í ár. Hetta eru næmingar úr øllum landinum og við nógvum ymiskum fortreytum. Leygardagin hittust næmingarnir á skúlanum á Kambsdali til ein innleiðsludag. Tey fingu eina stutta innleiðslu í forrit o.a., sum verða brúkt til fjarlesturin, umframt at lærararnir stutt greiddu frá einstøku lærugreinunum.

# Føroyingar líkjast ikki dønum

– Stórt rok hevur verið síðani Innlendismálaráðið táttaði í treytirnar fyri uppihalds- og arbeiðsloyvum. Men tjakið hevur bert snúð seg um ítróttarfólk. Málið hevur tó nógv størri dýpd, og neyðugt er, at landstýrið hugsar seg væl um.

Hetta skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu sínari, dagfest í gjár. Víst verður á, at danski útlendingapolitikkurin nú fær avleiðingar fyri føroyingar, og at spurningurin er, um danski politikkurin hóskar til føroysk viðurskifti.

– Tað er ikki bert í ítrótti, at tað er brúk fyri hægri støði, um vit skulu kappast við umheimin. Um vit framhaldandi ætla at fáa meirvirðið burtur úr okkara rávøru, er neyðugt, at landsstýrið hugsar seg sera væl um.

Vinnuhúsið skrivar, at tað er til ampa fyri føroyingar at samanbera okkum við danir á útlendingaøkinum, tí londini kunnu ikki samanberast. Ístaðin skal leitast til Íslands, sum er meir líkt Føroyum, tá tað kemur til vinnubygnað, skrivar Vinnuhúsið.

– Hetta árið er ivaleyst ásannað, at danskur útlendingapolitikkur gevur trupulleikar hjá okkum. Hetta er ikki ein spurningur um samband ella sjálvstýri, men ein staðfesting av, at okkara veruleiki á hesum øki als ikki líkist tí danska, skrivar Vinnuhúsið.

## Løgmaður skal svara um serfrøði

Jenis av Rana tykist ikki vera nøgdur um, at Vinnu- og Fiskivinnumálaráðið hava nýtt útlendskar serfrøðingar, sum í mongum førum hava havt sera kontroversiell sjónarmið.

Serliga verður her sipað til ráðgevingina frá íslendska Jón Kristiansson innan fiskivinnuøkið, og innbjóðingina av Bjørn Lomborg til kjak um orku- og umhvørvisspurningar.

Tingmaður miðfloksins vil tí hava at vita frá løgmanni, hvørt tað er tilvitað, at Føroya Landsstýri velur ivasama serfrøði framum, og hvørt løgmaður kann vátta, at kostnaðurin fyri hesar báðar serfrøðingarnar togaði upp móti teimum 100 tkr.

-jm




Vika 336, 2004
www.kaupthing.fo

# Oljan lækkað munandi

MARKNAÐARRÁK

Framhaldssøgan um oljuna heldur fram. Í seinastu viku skrivaðu vit, at stórt sannlíkindi var fyri, at oljuprísurin kundi hækkað í 50 dollarar fyri tunnuna. Hetta gjørdist ikki veruleiki á hesum sinni, og oljuprísurin náddi fyribils hæddini farna fríggjadag á uml. 49 dollarum fyri tunnuna. Síðan er oljan lækkað javnt og samt til 43 dollarar. Hetta svarar til eina lækking á yvir 12%.

Í løtuni er lítil møguleiki fyri, at oljan hækkar aftur til 50 dollarar, og júst sannroyndin, at oljan ikki náddi 50, kann føra við sær, at prísurin lækkar meira. Orsøkin er tann, at høgi oljuprísurin ikki er hækkaður orsakað av grundleggjandi áðum, men av spekulatión. Fyribils tykist henda spekulativa bløðran at verða brostin, samstundis sum rættlag tykist at verða komið á irakisku oljuveitingarnar aftur, og útlit er fyri einari loysn á Najafstríðnum. Vandi er kortini allatíðina fyri, at óvissa um oljuveitingina kann trýsta prísin upp aftur.

Hóast lækkaða oljuprísin, hækkaðu renturnar tó ikki nógv. Orsøkin var, at fleiri av búskapartølunum vóru heldur vánalig. Tó var næsta uppgerðin av BTÚ í USA í 2. ársfj. góð. BTÚ vaks 2,8% og ikki sum væntað 2,7%. Samstundis vísti talið eina holla persónliga nýtslu. Hesi tíðindini fingu lánsbrævarentur og partabrøv at hækka. BTÚ-tølini styrkja trúnna um, at framgongdin í USA er á røttu leið, og at FED hækkar renturnar í septembur.

A.P. Møller - Mærsk kunngjørdi góðan roknskap fríggjadagin, tá tey kundu vísa á eitt yvirskot á 9,9 milliardir krónur. Samstundis hækkaðu tey metingina um heilársúrslitið. A.P. Møller hækkaði 2,3% fríggjadagin í 43.700.

Eftir at renturnar eru lækkaðar javnt og samt seinastu vikurnar, metur Kaupthing, at útlit nú er fyri, at renturnar fara at hækka nakað aftur. Orsøkin er lækkaði oljuprísurin, og júst hesin fer eisini at føra við sær, at partabrøvini fara at standa seg væl. Størstu ávirkan á gongdina fær tó mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin, ið verður kunngjørd fríggjadagin. Verður hendan góð, fáa vit eitt tíðarskeið við hækkandi rentum og partabrøvum. Verður frágreiðingin vánalig, verður rentuhækkingin útsett hóast hon fer at koma.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,53% | -0,02% |
| 5 ára lánsbræv | 3,57% | -0,02% |
| 10 ára lánsbræv | 4,22% | -0,02% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 269,1 | 0,2% |
| OMX, Svøríki | 688,2 | 1,3% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.701,2 | 1,5% |
| S&P 500, USA | 1.107,8 | 0,9% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,00 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 167,48 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 79,38 | 2,9% |
| Altjóða Vøkstur | 58,58 | 3,2% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 618,41 | 1,0% |
| EUR | 743,68 | 0,0% |
| GBP | 1.107,09 | 0,0% |
| NOK | 89,00 | -1,1% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Enn ein feit byrjan

**ROX 2004 konsertin var á Margarinfabrikkini um vikuskiftið. Fleiri ungir bólkar vóru á palli, og sum heild var talan um góðar framførslur**

UMMÆLI
*Karl Anton Klein*

Margarinfabrikkin hevur seinastu árini verið so at siga einasta alternativið, tá tað snýr seg um hjá ungum rokkbólkum at sleppa á pall at spæla originalan tónleik.

Við jøvnum millumbilum síðstu 4-5 árini hevur verið skipa fyri konsertum eina ella tvær ferðir um mánaðin í vetrarhálvuni.

Flestu bólkar sum eru nakað ella hava framtíðina fyri sær í Havn í dag hava traðkað sínar barnaskógvar á lítla pallinum í Margarinfabrikkini. Hóast pallurin er lítil í vavi, hevur hjartarúmið verið stórt og tí hevur altíð verið pláss fyri teimum, sum bara droymdu um at sleppa á eitt nú ólavsøkukonsertina, at spæla á MF.

Eitt gott dømi er ROX 2004 konsertin, har allir bólkarnir hava eitt vist tilknýtið til MF. Nevniliga at teir flestu venja í venjingarhølum ARTs á loftinum í MF, eitt stað sum í minsta lagið kann kallast ein kraftdepil í Føroyska rokklívinum.

## Ein feit konsert

Fríggjakvøldið 27 var so aftur latið upp fyri einum vetrarhálvári sum fer at vísa at tónleikurin í Havn livir í besta velgående.

Hetta kvøldið var nevniliga fyrsta konsertin á pallinum í MF.

Fyrstir á pallin vóru Paradox, sum so at siga eru vaksnir upp á MF.

Teir spældu betur enn nakrantíð. Og sjálvt um teir ikki vóru so væl nøgdir við at byrja, so vístu teir, at teir eru í fullari ferð framm millum teir vaksnaru tónleikarnar, og at teir bestemt ikki smæðast burtur.

Teir spældu bæði egin og lænt løg. Stuttligt var at hoyra teir spæla gamla klassikaran hjá Deep Purple, Never Before, uttan at ræðast guitarsolo ella ikki heilt lættar guitarlinjur.

Serliga kann nevnast Heini sum eg vil kalla ein Kamikaze-guitarist/sangara. Hann er púra óávirkaður av, um hann skal spæla eina guitarsolo hjá Ozzy ella hjá Ritchie Blackmore. Tað er sera flott, tá hugsað verður um, at hann eini 15 ára gamal.

Næsti bólkur á pallinum var LAM. Ein bólkur við eit sindur royndari tónleikarum, men sum eftir mínum tykki ikki kom so langt sum Paradox, tí teir bert spældu »coverløg«.

Men teir spældu tey tó sera hegnisliga, og sjálvandi komu teir eisini upp at ringja við hvørt. Men eftir mínum tykki var hetta 80'ara tónleikur sum mær iki dámar so væl. Fyri at siga tað stutt, so er fínt við guitarriffum , men um sálin manglar, so missi eg skjótt følingina.

Triði bólkurin á pallin var The story ends. Og tað verður í mínum hugaheimi ofta til The story never ends, tí tú skalt leita longi eftir at finna ein stuttligari bólk enn hendan.

Stutt sagt kann sigast, at teir ikki spæla nakað serliga væl, hóast teir spæla betur nú enn fyrr. Men teir hava so stuttliga framførðslu, at onki eyga er turt. So ger tað einki, at Filip ikki hevur skriva eitt orð til tekstin, sum hann skal syngja. Tað ljóðar sum hann meinar hvørt orð

## Fjøldin

Aftur hetta kvøld hevði ein hampulig, edrú áhoyrarafjøld funnið sær leiðina oman í MF.

Hetta aftur skal skiljast í álvara, tí tað kemur næstan ikki fyri at onkur kemur á konsert á MF við kenning. Tey ungu sum ganga á konsert í MF hava lært at lurta eftir tónleiki, og tey vita, at tá tey koma, er tað fyri at stuðla teirra vinum sum trína á pallin. Og her má sigast at uppbakningurin er sera góður.

Tað er ein fragd at síggja, hvussu góðan stuðul tey ungu sýna hvørjum øðrum.



*Hóast Filip og hansara menn kanska ikki hava størstu tónleikaligu dygdirnar, so skal leitast leingi, fyri at finna ein bólk við stuttligari framførslum*

*Heini er púra óávirkaður av um hann skal spæla eina guitarsolo hjá Ozzy ella hjá Ritchie Blackmore. Sera flott, tá hugsað verður um, at hann eini 15 ára gamal.*



# Langt norðureftir

Fylgisveinagrindin hjá náttúrugripasavninum hevur framvegis kós norðureftir.

Fyrsta samdøgrið varð kósin annars sett í ein landssynning, men síðani hevur tað gingið mest sum beina leið norðureftir. Og sum tað sæst á kortinum, so eru drúgvir teinar, sum verða lagdir afturum hvønn dagin.

Enn eru sendararnir eisini á øllum sjey hvalunum, sum vórðu merktir, og enn er eingin teirra farin úr bólkinum. Hetta var í øllum førum støðan, tá vit seinast fréttu frá Náttúrgripasavnum mánamorgunin. Ætlandi skuldi nýtt kort leggjast á slóðina, www.ngs.fo/sat2004/index.htm, seinnapartin mánadagin.

*-jm*

